LM-008/2026

# Løgmansskrivstovan

| | |
|---|---|
| Dagfesting: | 18.08.2026 |
| Mál nr.: | 25/21706 |
| Málsviðgjørt: | SR, BL |
| Ummælistíð: | 27.11.25 til 08.01.26 |
| Eftirkannað: | 29.05.2026 |

**Uppskot til**

**Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um ræði á málum og málsøkjum (Ræðislógin)**
(Yvirtøka av málsøkinum rúsandi evni)

### § 1

Í løgtingslóg nr. 41 frá 10. mai 2006 um ræði á málum og málsøkjum (Ræðislógin), sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 38 frá 16. mai 2024, verður § 1, stk. 2, nr. 7 orðað soleiðis:
"7) Heilsumál, læknar, jarðarmøður, sjúkrahús, tó ikki:
a) Farsóttir.
b) Rúsandi evni."

### § 2

Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. januar 2027.

## Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

### 1.1. Orsakir til uppskotið
Málsøkið rúsandi evni er í løtuni felagsmál, hóast málsøkið verður umsitið og í høvuðsheitum fíggjað av føroyskum myndugleikum.

Verður uppskotið samtykt, fáa føroyskir myndugleikar møguleika at regulera økið við løgtingslóg og harvið betri møguleika at skipa henda partin av heilsuverkinum við atliti at serligum føroyskum viðurskiftum.

Umframt hetta verður tilgongdin at evna til og seta í gildi lóggávu á økinum stytt, tí tilgongdin at seta kongligar fyriskipanir og kunngerðir grundað á kongligar fyriskipanir í gildi fyri Føroyar inniheldur nøkur eyka lið, í mun til tilgongdina at seta løgtingslógir og føroyskar kunngerðir í gildi.

Viðvíkjandi rúsandi evnum er alneyðugt, at nýggj rúsandi evni stundisliga vera sett á listan yvir evni, ið einans kunnu nýtast til medisinsk og vísindalig endamál. Heilsu- og orkumálaráðið hevur royndir við, at tað tekur sera langa tíð at fáa broytt galdandi kunngerð um rúsandi evni, so at nýggj rúsandi evni koma á listan yvir evni, ið einans kunnu nýtast til medisinsk og vísindalig endamál. Heilsu- og orkumálaráðið metir, at hetta er grundað á, at málsøkið er felagsmál, og at um føroyskir myndugleikar yvirtaka ábyrgdina av málsøkinum, verður tað lættari og skjótari at dagføra galdandi kunngerð um rúsandi evni.

### 1.2. Galdandi lóggáva
"Lov om euforiserende stoffer" er sett í gildi fyri Føroyar við kongligari fyriskipan nr. 347 frá 21. desember 1956, nr. 442 frá 22. august 1969, nr. 150 frá 21. marts 1988 og nr. 1321 frá 2. desember 2014 við teimum broytingum, sum føroysk viðurskifti krevja. Tær kongligu fyriskipanirnar eru savnaðar í fyriskipanarkunngerð nr. 1349 frá 23. november 2015. Harafturat kemur anordning nr. 90 af 31. januar 2025 for Færøerne om euforiserende stoffer, som ændret ved bekendtgørelse nr. 982 fra 1. juli 2025.

Ved kongelig resolution af 9. maj 1964 har Danmark ratificeret FN's Enkelt Konvention af 30. marts 1961 om kontrol med narkotiske midler, og ved kongelig resolution af 4. april 1975 har Danmark ratificeret ændringsprotokol af 25. marts 1972 til enkeltkonventionen af 30. marts 1961. Ved kongelig resolution af 4. april 1975 har Danmark ratificeret konvention af 21. februar 1971 om psykotrope stoffer. Ved kongelig resolution af 3. december 1991 har Danmark ratificeret FN-konventionen af 20. december 1988 imod ulovlig handel med narkotika og psykotrope stoffer.

Tað framgongur av § 5 í lov nr. 137 frá 23. mars 1948 um føroyska heimastýrið, at føroyska heimaræðið nær sum helst er avmarkað av teimum verandi sáttmálaligu og øðrum altjóða rættindum og skyldum.

### 1.3. Endamálið við uppskotinum
Endamálið við lógaruppskotinum er formliga at yvirtaka málsøkið rúsandi evni. Við uppskotinum fáa føroyskir myndugleikar, sambært lóg nr. 79 frá 12. mai 2005, um mál og málsøki føroyskra myndugleika at yvirtaka, lóggávuvaldið og útinnandi valdið á nevnda málsøki.

**1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum**

Við hesum lógaruppskotinum verður málsøkið rúsandi evni formliga yvirtikið. Við uppskotinum fáa føroyskir myndugleikar lóggávuvald og útinnandi vald á nevnda málsøki.

**1.5. Ummæli og ummælisskjal**

Lógaruppskotið hevur verið til hoyringar hjá: Sjúkrahúsverkinum, Heilsustýrinum, Landsapotekaranum, Landslæknanum, Sjúklingaráðnum, MEGD, TAKS, Føroya Kærustovni, Løgmálaráðnum, Løgregluni, Sorinskrivaranum og Ríkisumboðnum.

Hoyringarsvar, umframt svar til hesi kunnu lesast í punkt “1.5. Ummæli og ummælisskjal” í løgtingsmáli um: uppskot til løgtingslóg um broyting í anordning for Færøerne om euforiserende stoffer (Myndugleikaflytingar vegna yvirtøku av málsøkinum rúsandi evni).

## Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

### 2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Føroyskir myndugleikar fara eftir yvirtøkuna at bera tær útreiðslur, sum standast av málsøkinum. Landskassin ber longu flestu útreiðslurnar av málsøkinum euforiserandi evni.

Av tí at føroyska tollvaldið longu umsitur uppgávuna við eftirliti við innflutningi v.m. av euforiserandi evnum til Føroyar, verður ikki mett, at yvirtøkan av málsøkinum euforiserandi evni fer at fáa avleiðingar fyri eftirlitið við innflutningi og útflutningi av euforiserandi evnum í Føroyum.

Sundhedsstyrelsen røkir uppgávuna, sum snýr seg um váðameting av nýggjum evnum, harundir í samstarvi við aðrar myndugleikar at hava eftirlit við rúsevnamarknaðinum, og eftir umstøðunum mæla Indenrigs- og Sundhedsministeriet til, at evnini verða tikin við í skipanina. Sundhedsstyrelsen brúkar umleið 940.000 kr. árliga, sum eisini fevnir um útgjaldið hjá stovninum til rættarkemi- og rættarlæknastovnarnar fyri at gera greiningar v.m.

Umframt hesa upphædd metir stovnurin, at umleið 0,25 ársverk verður brúkt til at avgreiða uppgávurnar. Sundhedsstyrelsen hevur ikki møguleika at meta um starvsfólkaorkuna, sum serliga viðvíkur Føroyum.

Lægemiddelstyrelsen brúkar ávísa starvsfólkaorku til at røkja tær uppgávur, sum hava við lógliga nýtslu av euforiserandi evnum at gera, tí tað eru fleiri enn 100 fyritøkur í Danmark, sum handfara, innflyta og útflyta euforiserandi evni.

Lægemiddelstyrelsen brúkar lítla starvsfólkaorku til omanfyristandandi uppgávur, sum serliga viðvíkja Føroyum. Hetta kemst av, at sambært ásetingunum í kunngerðini um euforiserandi evni um innflutning og útflutning av euforiserandi evnum, er ikki neyðugt at gera innflutnings- og útflutningsváttanir í sambandi við sendingar av euforiserandi evnum, harundir heilivágum, sum innihalda euforiserandi evni, millum Danmark og Føroyar.

Sambært Lægemiddelstyrelsen fær føroyska apoteksskipanin meginpartin av heiliváginum, sum inniheldur euforiserandi evni, frá donskum heilsølum, sum veita neyðugu váttanirnar, um talan er um heilivág, sum verður innfluttur til Danmarkar. Nakað av innflutta heiliváginum senda heilsølurnar til Føroyar. Av tí at hetta sum nevnt hendir, uttan at váttan er útflýggjað, er Lægemiddelstyrelsen ikki vitandi um, hvussu nógvur heilivágur, sum inniheldur euforiserandi evni, verður sendur til Føroya. Sambært Apoteksverkinum halda heilsølurnar Nomeco og AMGROS, sum standa fyri meginpartinum av sendingunum av heilivági til Føroyar, ikki skil á, hvørji heilivágssløg, sum innihalda euforiserandi evni, verða send til Føroyar.

Lægemiddelstyrelsen hevur ikki útskrivað virkisloyvi til føroyskar fyritøkur. Tey seinastu árini hevur Lægemiddelstyrelsen útskrivað millum 2 og 8 innflutningsváttanir til Framleiðsluapotekið um árið. Við nøkrum árum ímillum ger Lægemiddelstyrelsen eina GMP-kanning (framleiðslu) av Tjaldurs Apoteki, sum Føroyar rinda fyri.

Sambært Apoteksverkinum verður Codeine í løtuni innflutt úr Týsklandi og Noregi til Føroya, og sum tilvísingarevni úr Fraklandi. Harumframt innflytur Apoteksverkið medisinskt kannabis úr Hollandi við váttan frá Lægemiddelstyrelsen.

Av tí, so vítt Lægemiddelstyrelsen veit, einki stórvirksemi er á hesum øki í Føroyum, og av tí at ongar føroyskar fyritøkur eru, sum umsita euforiserandi rúsevni, heldur Lægemiddelstyrelsen, at omanfyri nevndu uppgávur helst verða avmarkaðar. Tað veldst tó um skipanina, sum verður uppbygd og um tilgongdirnar, sum verða nýttar í dag, verða varðveittar. Til dømis at danskar heilsølur typiskt veita heilivágin, og ongar etableraðar fyritøkur eru í framtíðini við virksemi, sum krevur loyvi og eftirlit.

Føroyar fara ikki at hava útreiðslur í sambandi við tey sáttmálarættindi og tær skyldur, sum standast av rúsevnasáttmálunum hjá ST, í tann mun føroyska heimastýrið er avmarkað í sínum myndugleika at røkja hesar uppgávur, sambært § 5 í lóg nr. 137 frá 23. mars 1948 um føroyska heimastýrið.

Út frá omanfyristandandi verða útreiðslurnar í sambandi við yvirtøku av málsøkinum rúsandi evni væntandi avmarkaðar.

**2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur**
Flestu uppgávurnar á málsøkinum rúsandi evni liggja longu hjá føroyskum myndugleikum.
Í løtuni hevur Indenrigs- og Sundhedsministeriet, sum ábyrgdarhavandi av málsøkinum, m.a. til uppgávu at tryggja, at lóggávan er í samsvari við tær altjóða skyldur, sambært narkotikakonventiónini hjá ST, sí undir "galdandi lóg". Hetta fevnir millum annað um at tryggja, at evni sum Narkotikakommission hjá FN (Commission on Narcotic Drugs (CND)) setir á FN's narkotikakonvention frá 1961 og psykotropkonvention frá 1971, eisini verður tikið við í kunngerðini um euforiserende stoffer.

Føroyska tollvaldið hevur eftirlit við innflutningi o.a. av euforiserandi evnum til Føroyar. Stinga ivamál seg upp í sambandi við evni, sum verða innflutt og tørvur er á fakligari meting, samstarvar Tolleftirlitið við Apoteksverkið um tað.

Heimildirnar hjá Sundhedsstyrelsen eru at finna í § 1, stk. 1 og § 2, stk. 1, í kongligu fyriskipanini og § 5, stk. 2 í kunngerðini. Verður málsøkið yvirtikið, yvirtekur Heilsustýrið hesar heimildir. Ein uppgáva, sum Sundhedsstyrelsen hevur eftir lógini, er váðameting av nýggjum evnum og eftir metingini mæla Indenrigs- og Sundhedsministeriet til at taka evnini við í kunngerðina um euforiserandi evni. Fyri at fremja hesa uppgávu er neyðugt at hava neyvt eftirlit við rúsevnamarknaðinum, umsiting av rættarkemiskum og rættarmedisinskum greiningum og víðarilatan av upplýsingum innanlands eins og altjóða. Uppgávan verður røkt í tøttum samstarvi við Ríkisløgregluna, politiringarnar, rættarmedisinsku stovnarnar og tollvaldið.

Eftir kunngerðini umsitur danska Lægemiddelstyrelsen eina røð av uppgávum fyri Føroyar, sum viðvíkja lógligari nýtslu av euforiserandi evnum, harundir heilivág, sum inniheldur euforiserandi evni. M.a. snýr tað seg um uppgávur í sambandi við:

1. Útskriving av loyvum til virkir, útflýggjan av innflutnings- og útflutningsváttanum, móttøka av frágreiðingum um virksemi við euforiserandi evnum og eftirlit við virksemi við euforiserandi evnum.

2. At meta um væntaða nýtslu av euforiserandi evnum, og at stovna og viðlíkahalda eina skipan, sum fylgir við, at metingar verða hildnar.

3. Innsavnan av hagtalsupplýsingum um keyp, nýtslu og goymslu av euforiserandi evnum.

Uppgávurnar hjá Lægemiddelstyrelsen endurspegla í stóran mun skyldur sambært narkotikakonvensjónunum hjá ST. Sum avleiðing av hesum skyldum hevur Lægemiddelstyrelsen eisini ábyrgd av at boða narkotikaeftirlitsstovninum hjá ST (International Narcotics Control Board (INCB) frá metingum yvir væntaða nýtslu av euforiserandi rúsevnum og hagtalsupplýsingum um veruliga nýtslu. Metingar og upplýsingar sambært teimum trimum omanfyrinevndu uppgávunum eiga at fráboðast Lægemiddelstyrelsen, ið sum málsráðandi myndugleiki sambært narkotikakonvensjónum hjá ST letur INCB eina samlaða fráboðan.

Verður málsøkið yvirtikið, yvirtekur landsapotekarin hesar heimildir. Tó eigur Lægemiddelstyrelsen framhaldandi at hava heimild at røkja tær uppgávur í Føroyum, sum eru ásettar í narkotikakonvensjónunum hjá ST, sí meir um hetta beint niðanfyri.

*Narkotikakonvensjónir hjá Sameindu tjóðum*

Skipanin við konvensjónum er sett upp soleiðis, at Danmark og hini londini, sum hava tikið undir við sáttmálunum, hvør sær seta ein málsligan myndugleika, sum m.a. hevur ábyrgdina av at útskriva innflutnings- og útflutningsváttanir. Lægemiddelstyrelsen er málsráðandi myndugleikin fyri Danmark.

Eftir føroyska yvirtøku av málsøkinum "euforiserende stoffer", hevur Lægemiddelstyrelsen ikki longur nakran myndugleika í Føroyum og sleppur tí ikki at røkja tær uppgávur, sum eru álagdar stovninum.

Eftir at hava yvirtikið ábyrgdina av málsøkinum "euforiserende stoffer" mugu Føroyar tryggja, at lóggávan og umsitingin av hesum er í samsvari við rúsevnasáttmálarnar hjá ST, sum Danmark hevur tikið undir við. Føroyskir myndugleikar fara at kunna tryggja sítt samsvar við sáttmálarnar, við í roynd og veru at tryggja, at tey evni, sum ST-nevndin fyri rúsevni hevur tikið við í sáttmálarnar, verða tikin við í kunngerðina um euforiserandi evni. Indenrigs- og Sundhedsministeriet fer at kunna Heilsu- og orkumálaráðið um allar broytingar í lóggávuni um euforiserandi evni, sum danskir myndugleikar seta í gildi. Serliga fer Heilsu- og orkumálaráðið at verða ávarað um broytingar, sum gera, at avleiðingar eru í nýggjum altjóða skyldum, sum standast av rúsevnasáttmálunum hjá ST.

Neyðugt er við heimild í danskari lóggávu fyri myndugleikaútinnan hjá stovninum í Føroyum. Harumframt eigur ein samstarvsavtala at verða gjørd um, at Lægemiddelstyrelsen framhaldandi skal hava ábyrgdina av at útskriva innflutnings- og útflutningsváttanir umframt hinar uppgávurnar, sum standa í sáttmálanum, og umframt hvussu Indenrigs- og Sundhedsministeriet frameftir kunnar Heilsu- og orkumálaráðið um nýggj evni, sum í samsvari við ST-sáttmálarnar skulu takast við í føroysku kunngerðina um euforiserandi evni.

Sambært § 2 í hesum lógaruppskoti, er gildiskoman 1. januar 2027. Á henda hátt hava føroysku myndugleikarnir stundir til at fyrireika seg til yvirtøkuna og stundir til at gera neyðugar samstarvsavtalur við danskar myndugleikar.

Mett verður ikki, at uppskotið hevur stórvegis umsitingarligar avleiðingar við sær.

**2.3. Avleiðingar fyri vinnuna**
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri vinnuna.

**2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið**

Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri umhvørvið.

**2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum**
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

**2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir**
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir.

**2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum**
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri millumtjóða sáttmálar.

**2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar**

1) Evropeiski mannarættindasáttmálin, EMRS, "Anordning nr. 136 af 25. februar 2000 om ikrafttræden for Færøerne af lov om den europæiske menneskerettighedskonvention". Sáttmálin var settur í gildi fyri Føroyar við lóg tann 1. mai 2000.

   Uppskotið hevur ikki avleiðingar í mun til nevnda sáttmála.

3) Sáttmáli Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek, ið áleggur limalondunum at menna og fremja politikk, lógir og fyrisitingarlig mál, ið skulu tryggja rættindi hjá fólki, ið bera brek. Sáttmálin er kunngjørdur við Bekendtgørelse nr. 20 af 15. november 2017 af FN-konvention af 13. december 2006 om rettigheder for personer med handicap.

   Uppskotið hevur ikki avleiðingar í mun til nevnda sáttmála.

**2.9. Markaforðingar**
Uppskotið hevur ikki slíkar avleiðingar.

**2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv**
Uppskotið hevur ikki slíkar avleiðingar.

**2.11. Skattir og avgjøld**
Uppskotið hevur ikki slíkar avleiðingar.

**2.12. Gjøld**
Uppskotið hevur ikki slíkar avleiðingar.

**2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?**
Uppskotið hevur ikki slíkar avleiðingar.

**2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrisfólkið, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?**
Ja, við yvirtøkuni fær landsstýrisfólkið heimildirnar, sum higartil hava ligið hjá donskum ráðharra.

**2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?**
Uppskotið hevur ikki slíkar avleiðingar.

**2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?**
Uppskotið hevur ikki aðrar avleiðingar.

**2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum**

| | Fyri landið ella landsmyndug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss ella øki í landinum | Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umsitingarligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Ja | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | Nei | Nei | |

## Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

### 3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

**Til § 1**
Við hesi grein verður yvirtøkan av málsøkinum rúsandi evni formliga framd.

Við "rúsandi evni" er at skilja "euforiserende stoffer".

**Til § 2**
Gildiskomuáseting. Skotið verður upp, at lógin kemur í gildi tann 1. januar 2027. Hetta soleiðis, at føroyskir myndugleikar hava stundir til at fyrireika yvirtøkuna og at gera neyðugar samstarvsavtalur við danskar myndugleikar.

Løgmansskrivstovan, tann 18. august 2026

**Beinir Johannesen**
løgmaður

/ John Rajani

**Yvirlit yvir fylgiskjøl:**
Fylgiskjal 1: Javntekstur